## Fiskimálaráðið
SKIPAEFTIRLITIÐ

# Fulltrúi/málsviðgeri

Skipaeftirlitið/Sjóvinnufyrisitingin søkir hervið eftir einum fulltrúa/málsviðgera til setan skjótast gjørligt.

Skipaeftirlitið/Sjóvinnufyrisitingin er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum, og arbeiðsstaðurin er Miðvágur.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
1 málsviðgerð innan sjóvinnulóggávu
2 útgávu av sjóvinnubrøvum, siglingarbókum og samleikaprógvum
3 átekna heilsuprógv, viðgera undantaksloyvir til mynstringar v.m.
4 vanligt skrivstovuarbeiði
5 telefonavgreiðsla

**Førleikakrøv**

**Til starvið krevst:**
6 viðkomandi útbúgving
7 góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
8 telduførleika á brúkarastøði
9 góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
10 góð samstarvsevni

Grundleggjandi royndir innan virkisøkini er ein fyrimunur.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið/Sjóvinnufyrisitingin.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Skipaeftirlitinum/Sjóvinnufyrisitingini í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2003 kl. 12.00

Umsóknir skulu sendast til:

**Skipaeftirlitið, Box 26, 370 Miðvágur**

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 355600 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra ella tlf. 353030 og tosa við Johild Ziskason, fulltrúa.

HOYVÍK

# Fólk til deildina við viðskera

Keypssamtøkan í Hoyvík sóknast eftir fólki til deildina við viðskera.

Tann ið settur verður, má kunna arbeiða sjálvstøðugt og helst hava royndir frá líknandi arbeiði.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, at byrja 1. mai 2003 ella eftir avtalu.

Løn samb. S&K.

Meira fæst at vita um starvið og arbeiðstíðir, við at venda sær til Bent Lundsgaard, tlf. 31 41 49.

Skrivlig umsókn skal í seinasta lagi 12. apríl sendast til

FK Hoyvík
Box 349
188 Hoyvík

# Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli

Helle Mogensen heldur skeið, sum hon kallar **»Inspirationskursus i broderi, strik og hækling for håndarbejdslærere, fritidspedagoger og andre, der er interesseret i at arbejde med børn«.**

Pláss er fyri 2 flokkum.

**Flokkur I**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Týsdag | 8. apríl | 09.00-15.00 | broderi – tryk og frie sting |
| Mikudag | 9. apríl | 09.00-15.00 | broderi – bånd-, perle- og pallietbroderi |
| Hósdag | 10. apríl | 09.00-15.00 | strik – filt, perler, tyll… |
| Fríggjadag | 11. apríl | 09.00-15.00 | hækling – blomster, perler, klunker, gimpning… |

**Flokkur II**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadag | 14. apríl | 18.00-23.00 | broderi – tryk, frie sting, bånd-, perle- og pallietbroderi |
| Týsdag | 15. apríl | 18.00-23.00 | strik – filt, perler, tyll… |
| Mikudag | 16. apríl | 18.00-23.00 | hækling – blomster, perler, klunker, gimpning… |

Skeiðini verða hildin í Kommunuskúlanum.

Luttøkugjald: Flokkur I 500 kr.
Flokkur II 400 kr.

**Tilmelding tlf. 31 77 55**


## Haldarar hjá Dimmalætting og Sosialinum,

**sum ikki fáa leygardagsbløðini, verða biðin um at ringja tlf. 229725 leygardag millum kl. 11 og 14**

**Prentmiðstøðin**


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr**. P/F 2711, P/F Havnar Fótbóltur, 100 Tórshavn.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Niels Christian Nolsøe, Berjabrekka 45, 100 Tórshavn og Kaj Leo Holm Johannesen, á Teigi 6, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 1. apríl 2003*

*Kristin Balle*


Bilar Lýsingar Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn Skráir

veitst tú ikki tað?

Sosialurin Sosialurin i




LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Byggifrøðingur ella verkfrøðingur
## til Brunaumsjón Landsins

Starv sum byggifrøðingur ella verkfrøðingur á Brunaumsjónini hjá Landsverkfrøðinginum er leyst at søkja.
Til rætta fólkið kunnu vit bjóða eitt spennandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðsuppgávur hjá Brunaumsjón landsins eru m.a. hesar:
- Eftirlit við sløkkiliðum, sløkkiútgerð, tilkallingarskipanum, regluverðum og útbúgvingum av sløkkiliðsfólki
- Vegleiðing fyri kommunur og aðrar myndugleikar í sløkkimálum og ráðgeving fyri vinnurekandi
- Loyvisgevandi fyri virksemi við vandamiklum evnum, flutningi og goymslum av eldfimum løgi og umsiting av byggireglum o.a.
- Málsviðgerandi og eftirlitshavandi við serligum byggiverkum og samkomustøðum o.a.

Roknast má við nakað av ferðing millum oyggjarnar, við tað at arbeiðast skal saman við kommunuumsitingum, ráðgevandi feløgum o.øðr. kring landið.

**Fakligur førleikakrøv**
Sóknast verður eftir byggifrøðingi ella verkfrøðingi e.l. við hondverkaraútbúgving e.l. í húsabygging og við starvsroyndum innan byggivinnuna.

Umsøkjarin skal hava ella kunna tilogna sær breiða vitan um byggingar og tað, sum knýtir seg til brunatrygd í heila tikið, vandamikil evni og tilbúgvingarlig viðurskifti í landi. Í hesum sambandi kann roknast við at viðkomandi skal taka lut í ymsum skeiðum innan- og uttanlands.

Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, og ynskja vit, at umsøkjarin er fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni, dugir at skipa sítt arbeiðsøki og at taka sjálvstøðugar avgerðir.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Tænastustaðið er á skrivstovuni í Tórshavn.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til Landsverkfrøðingin, Postboks 78, 110 Tórshavn, og skulu verða skrivstovuni í hendi innan 25. apríl 2003. Brævbjálvin eigur at merkjast »Starv á Brunaumsjón landsins«. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Peturi Olsen, deildarleiðara, á telf. 31 13 33, (e-postur:plo@lv.fo)

## Útbjóðing
# Mykinesleiðin

SL fara við hesum, alment at bjóða út rutusiglingina á Mykines-leiðini í summar við M/B Súluni. SL hava sum samferðslueind, vegna landið, til uppgávu at samskipa sjóvegis og landvegis samferðslu, herundir planleggja, stýra og hava eftirlit við rutusiglingini hjá landinum.

**Útbjóðingin fevnir um**
**Øki:** Mykinesleiðin
**Leið:** 36, Sørvágur-Mykines

Harafturat ynskja SL at samstarvað verður um flutning, sum er uttanfyri vanligu ferðaætlanina á Mykinesleiðini, herundir eisini møguligan serflutning av ymiskum slagi.

**Krøv**
- Útbjóðingin skal virka fyri, at SL fær fíggjarligar og tænastuligar fyrimunir í rakstrinum.
- Sáttmálaskeiðið verður frá 1. mai - 31. oktober. 2003.
- Øll krøv og treytir verða annars ásett í útbjóðingartilfarinum.

**Tilboð**
Tilboð, merkt *"Útbjóðing Oyggjaleiðir"*, skulu vera innkomin til:
*Strandfaraskip Landsins*
*att. Fólkaflutningsdeildin*
*Postrúm 88*
*FO-110 Tórshavn*
í seinasta lagi 14. apríl 2003, kl. 12:00.

SL skilar sær rætt til frítt at velja millum innkomin tilboð ella at havna teimum øllum. Teir arbeiðstakarar, sum bjóða, kunnu verða hjástaddir, tá tilboðini verða latin upp á Strandfaraskipum Landsins, Yviri við Strond 4, 14. apríl 2003 kl. 12:00. Sæð verður burtur frá tilboðum, sum ikki eru innkomin til tíðina.

Útbjóðingartilfar kann umbiðjast hjá SL, tlf. 343000 ella t-post: pjt@ssl.fo. Áðrenn útbjóðingartilfar verður sent út, skulu kr. 1.000,- latast í depositum.

Nærri upplýsingar um útbjóðingina kunnu fáast við at venda sær til Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðara.

Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.

Árliga rakstraræltanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutnings-uppgávurnar fevna um alt landið

STRANDFARASKIP LANDSINS
34 30 30 • www.ssl.fo

REPROZ




<ph_1>

2. hvønn mikudag

Tað er feitt


# Frá Runavíkar kommunu

Mint verður á, at tíðaravmarkað parkering er sett í gildi á vestaru síðu á Heiðavegi frá Telebúðini til Heiðabúðina.

**Parkeringstíðirnar eru hesar:**

Mánadag til fríggjadag
1 tími frá kl. 9.00-18.00.

Leygardag
1 tími frá kl. 9.00-14.00.

Á eystari síðu á sama vegastrekki er steðgiforboð.




**Runavíkar kommuna**
Tekniska deild


Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn Skráir

Sosialurin Sosialurin i